VELJARAKANNING

SAMGONGAN TAPIR Í TRIMUM KANNINGUM

Tríggjar kanningar, gjørdar um sama mundið vísa, at samgongan hevði mist nógv. Andstøðan hevði fingið 19 tingfólk og samgongan 14

Eirikur Lindenskov

Føroyar høvdu fingið nýggjan løgmann og nýggja samgongu, um val hevði verið í vár. Tað vísa tríggjar veljarakanningar, sum eru gjørdar um sama mundið í apríl/mai í ár.

Hóast flytingarnar millum flokkarnar eru ymiskar, so vísa allar tríggjar kanningar sama býti millum samgongu og andstøðu: Samgongan fær 14 tingfólk og andstøðan 19.

Nýggjasta veljarakanningin, sum er komin undan kavi, er ein sum Lóður hevur gjørt fyri Fólkaflokkin, og sum Kringvarpið kunngjørdi í síðstu viku. Hon er gjørd um sama mundið sum hinar báðar, sum Lóðir og Gallup Føroyar gjørdu.

Kanningin gevur Fólkaflokkinum stóra afturgongd. Hann fær 17,4 prosent, sum er ein afturgongd upp á 5,1 prosentstig, ella seks tingfólk í mun til átta. Afturgongdin í prosentstigum er 5,1. Seinast Fólkaflokkurin hevði seks tingfólk var á valinum fyri 20 árum síðani í 1994.

Sambandsflokkurin hevði eisini í hesi kannigini fingið stóra afturgongd. Flokkurin hevði fingið 20,8 prosent í mun til 24,7, afturgongdin er 3,9 prosentstig, sum hevði givið flokkinum sjey tingfólk í mun til átta.

Javnaðarflokkurin hevði eisini í hesi kanningini fyri stóra framgongd, 7,8 prosentstig. Flokkurin hevði farið úr 17,8 prosentum í 25,6. Og tað hevði givið flokkinum átta tingfólk í mun til seks. Javnaðarflokkurin hevur ikki havt so stóra undirtøku síðani 1990, tá flokkurin fekk 27,5 prosent og 10 tingfólk.

Sjálvstýrisflokkurin hevði fingið laka undirtøku í hesi kanningini. Vit kenna ikki prosenttølini hjá Sjálvstýrisflokkinum í kanningini hjá Fólkaflokkinum, men hava bara fingið at vita, at flokkurin ikki fær umboðan á tingi.

Tjóðveldisflokkurin hevði fingið framgongd sambært kanningini, sum gevur flokkinum 20,8 prosent, sum er ein framgognd upp á 2,2 prosentstig og sjey tingfólk, ein meira enn á seinasta løgtingsvali.

Tølini hjá Framsókn og Miðflokkinum eru okkum heldur ikki kend. Bara tað, at Framsókn fær ein tingsess afturat og at Miðflokkurin missir annan tingsessin.

Her skal havast tað fyrivarni, at ein tingsessur manglar at býta. Her eru 32 tingfólk. Tá vit ikki hava tølini hjá smáu flokkunum, so fáa vit ikki roknað út, hvør fær 33. tingsessin.

Taka vit miðaltøllini hjá teimum stóru flokkunum úr hesum trimum veljarakanningunum, so verður úrslitið hetta:

Fólkaflokkurin: 17,5%
og sannlíkt 6 tingfólk
Sambandsflokkurin: 19%
og sannlíkt 6-7 tingfólk
Javnaðarflokkurin: 25,4%
og sannlíkt 8 tingfólk
Tjóðveldi: 21,4%
og sannlíkt 7 tingfólk

eirikur@sosialurin.fo



Sambandsflokkurin hevði fingið 20,8 prosent í mun til 24,7, afturgongdin er 3,9 prosentstig, sum hevði givið flokkinum sjey tingfólk í mun til átta
Savnsmynd

Sperrumark:
1/33 av atkvøðunum

Tingsessir

	KANNING MAI 2014	LØGTINGSV. 29-10-2011
Fólkaflokkurin	6	8
Sambandsflokkurin	7	8
Javnaðarflokkurin	8	6
Sjálvstýrisflokkurin	0	1
Tjóðveldi	7	6
Miðflokkurin	1	2
Framsókn	3	2

		FÓLKAFLOKKURIN	SAMBANDSFLOKKURIN	JAVNAÐARFLOKKURIN	SJÁLVSTÝRISFLOKKURIN	TJÓÐVELDISFLOKKURIN	MIÐFLOKKURIN	FRAMSÓKN	FÓLKAFLOKKURIN	SAMBANDSFLOKKURIN	JAVNAÐARFLOKKURIN	SJÁLVSTÝRISFLOKKURIN	TJÓÐVELDISFLOKKURIN	MIÐFLOKKURIN	FRAMSÓKN	SAMGONGAN TILS.	ANDSTØÐAN TIL S.
Løgtingsvalið okt 2011	*29-10-2011*	22,5	24,7	17,8	4,2	18,3	6,3	6,2	8	8	6	1	6	2	2	19	14
Gallup desember 2011	*30-11-2011*	19,2	24,9	20,2	2,7	18,9	5,9	8,4	7	8	7	0	6	2	3	17	16
Gallup februar 2012	*21-02-2012*	19,0	24,4	20,2	3,3	20,8	4,9	7,4	6	8	7	1	7	2	2	17	16
Gallup juli 2012	*03-07-2012*	15,7	22,2	23,1	2,9	22,1	7,2	6,8	5	8	8	0	8	2	2	15	18
Gallup november 2012	*09-11-2012*	19,6	23,5	20,8	2,7	21,8	5,8	5,9	7	8	7	0	7	2	2	17	16
Gallup februar 2013	*25-02-2013*	19,3	21,7	22,5	2,6	22,0	6,9	5,1	7	7	8	0	7	2	2	16	17
Gallup september 2013	*16-09-2013*	17,2	22,1	21,7	4,5	23,6	5,3	5,7	6	7	7	1	8	2	2	15	18
Lóður apr/mai 2014 (Fólkafl.)	*11-05-2014*	17,4	20,8	25,6		20,5			6	7	8	0	7	1	3	14	19
Gallup mai 2014	*02-05-2014*	17,8	15,7	25,1	4,1	23,0	7,7	6,5	6	5	8	1	8	3	2	14	19
Lóður mai 2014		17.4	20.5	25.6	3.4	20.8	4.6	7.7	6	7	8	1	7	1	3	14	19
Undirøtka í mun til valið		***-5,1***	***-3,9***	***7,8***	***-5,1***	***2,2***	***-6,3***	***-6,2***									